EFFO-DEILDIN 4. UMFAR

EB/Streymur fekk fyrsta **sigurin**

FÓTBÓLTUR FC Suðuroy gav teimum skarpan gang nær um allan dystin, men við 3-0-sigri kunnu teir úr EB/Streymi fegnast um fyrsta sigurin í Effodeildini

Pætur Albinus

EB/Streymur hevði eftir trý tey fyrstu umførini bara vunnið sær tvey stig og høvdu enn fyrsta sigurin í Effodeildini tilgóðar. Søti 4-2-sigurin á ÍF í steypakappingini kann tó hava vundið sundalagsmenn í gongd, tí í heimadystinum ímóti FC Suðuroy fingu teir nevniliga fyrsta sigurin til høldar – hetta hóast FC Suðuroy serliga í seinna hálvleiki einki stóð aftanfyri.

Tepur leiðsla

Gert Hansen hevur ein góðan arm hondbóltinum at takka, og fekk hetta ein stóran lut í fyrsta málinum. Hann kastaði nevniliga eitt langt innkast í feltið, har Egil á Bø var fúsur og stútaði bóltin í málið til 1-0.

Hóast EB/Streymur hevði greiða yvirtakið og við bólttryggum spæli vardi um leiðsluna, so vóru vágbingar ikki bara at spæla við. Vandamikli Jón Krosslá Poulsen lá framvið og hevði nakrar skotroyndir, men verjan hjá EB/Streymi var tøtt og fekk bjarga vandastøðunum, soleiðis at hálvleiksstøðan eisini var 1-0 til EB/Streym.

Revsaðir suðringar

Í seinna hálvleiki spældi FC Suðuroy seg av álvara upp og gav EB/Streymi skarpan gang. Hetta var myndin av seinna hálvleiki, men FC Suðuroy megnaði ongantíð at hótta EB/Streym nóg mikið til at fáa eitt mál.

Hetta vórðu teir revsaðir fyri. EB/Streymur, sum annars var undir trýsti, fekk tvey kærkomin mál ímóti dystarenda.

Smáar tíggju minuttir undan leikloki bleiv tað 2-0 til EB/Streym. Hans Pauli Samuelsen gjørdi gott forarbeiði og spældi bóltin til ein púra leysan Sorin Anghel, sum rundaði av. Í 89. minutti var tað so Hans Pauli Samuelsen sjálvur, sum slapp at seta krúnuna á verkið. Sorin Anghel takkaði fyri góða forarbeiðið í málinum frammanundan og átti hann uppleggið í hesum vakra málinum, sum Hans Pauli setti upp í málhornið og til endaliga úrslitið 3-0 til EB/Streym.

1. DEILD

Trý hava framvegis **fulla** úrtøku

07 Vestur, Víkingur og AB hava framvegis fulla úrtøku, nú kappingin í næstbestu fótbóltsdeildini er trý umfør gomul.

Merkisvert er tað, at hesi trý hava meiri enn tvífalt so nógv stig, sum tey hava, ið eru næst í røðini. Á fjórða plássi er B71, sum saman við 07 Vestur og AB kappast um tey bæði uppflytingarplássini. Fjórða liðið, ið hevur møguleika at flyta upp er Skála, ið burtur úr trimum teimum fyrstu umførunum bara hevur vunnið eitt stig.

07 Vestur vann í dag á heimavølli 3-0 ímóti KÍ. Øll málini vórðu skorað í 1. hálvleiki, og tað er framvegis einki mál farið ígjøgnum hjá Peturi Meinhard Magnussen, sum er uppvaksin í B68, og sum nú verjir málið á vágaliðnum.

Víkingur vann sera sannførandi 6-3 sigur á Sandi. Gestiirnir vóru frammanfyri 6-0, áðrenn heimaliðið síðsta korterið tríggjar ferðir svaraði aftur og fekk ein mann vísan av vølli. Tað man sjáldan koma fyri, at trý sjálvmál verða skorað í einum og sama dysti, men soleiðis var tað á Sandi ídag!

AB vann tryggan 4-1 heimasigur ímóti teimum næstbestu hjá HB, teir næstbestu hjá B68 megnaðu 2-2 á Skála, hóast heimaliðið var frammanfyri við tveimum málum, inntil tað restaði eitt korter, og teir næstbestu hjá NSí vunnu síni fyrstu stig við 3-2 heimasigri á teimum næstbestu hjá EB/Streymi.

joannes@sosialurin.fo

TB - B36 1-4 (0-1)

0-1: Lukasz Cieslewicz 42.
0-2: Súni Olsen 51.
1-2: Bojan Timic br 61.
1-3: Lukasz Cieslewicz 65.
1-4: Jákup á Borg 78.
Dómari: Dagfinn Forná

TB: Ivan Stojkovic - Tórur Mortensen, Dmitrije Jankovic, Hanus Mortensen, Martin Tausen - Dan Mortensen (Aron Sørensen, 69.), Gilli Sørensen (Patrik Johannesen, 85.), Poul Ingason, Rógvi Joensen, Bárður A. Dimon - Bojan Timic (Ragnar Tausen, 78.)
Gult kort: Dan Mortensen, Bárður A. Dimon
B36: Meinhardt Joensen - Bárður Olsen, Jonas Flindt Rasmussen, Atli Danielsen, Símun Joensen - Símun Hansen, Klæmint Matras, Súni Olsen (Hørður Askham, 84.), Róaldur Jacobsen - Rasmus Dan Sørensen, Lukasz Cieslewicz
Gult kort: Lukasz Cieslewicz, Jonas Flindt Rasmussen, Rasmus Dan Sørensen

HB - Víkingur 1-1 (1-0)

1-0: Christian R. Mouritsen br 29.
1-1: Kaj Leo í Bartalsstovu 72.
Dómari: Rúni Gaardbo

HB: Gestur Teitson - Tróndur Jensen, Rógvi Holm, Vagnur Mohr Mortensen, Alex José dos Santos (Eli Falkvard Nielsen, 81.) - Høgni Midjord (Jógvan Andrias Nolsøe, 46.), Fróði Benjaminsen, Christian R. Mouritsen, Hallur Hansson, Símun Samuelsen - Andrew av Fløtum (Kristin R. Mouritsen, 81.)
Gult kort: Andrew av Fløtum, Vagnur Mohr Mortensen, Rógvi Holm, Fróði Benjaminsen
Víkingur: Geza Turi - Bárður Hansen, Atli Gregersen, Erling Jacobsen, Hanus Jacobsen - Sølvi Vatnhamar, Fritleif í Lambanum, Evrard Blé, Hans Jørgen Djurhuus (Hjartvard Hansen, 43.), Kaj Leo í Bartalsstovu - Lasse Qvist (Joseph Bassene, 21.)
Gult kort: Atli Gregersen, Evrard Blé, Bárður Hansen, Hjartvard Hansen

EB/Str. - FC Suðuroy 3-0 (1-0)

1-0: Egil á Bø 7.
2-0: Sorin Anghel 84.
3-0: Hans Pauli Samuelsen 89.
Dómari: Ransin N. Djurhuus

EB/Streymur: René Tórgarð - Gert Hansen, Marni Djurhuus, Sorin Anghel, Jónhard Frederiksberg - Arnar Dam (Leif Niclasen, 66.), Niels Pauli Danielsen, Pauli G. Hansen (Brian Olsen, 87.), Egil á Bø, Hans Pauli Samuelsen - Levi Hanssen (Árni G. Olsen, 89.)
Gult kort: Egil á Bø, Sorin Anghel
FC Suðuroy: Stanislav Kuzma - Suni úr Hørg, Heini Vatnsdal, Sasa Kolman (Brandur Suðuroy, 51.), Karl í Lágabø - Palli Augustinussen (John T. Poulsen, 71.), Poul N. Poulsen (Heri Kjærbo, 83.), David Asare, Jón Áki Jacobsen, Ingi Poulsen - Jón K. Poulsen
Gult kort: Poul N. Poulsen, Suni úr Hørg,

B68 - NSÍ 3-2 (1-2)

0-1: Klæmint A. Olsen 13.
0-2: Klæmint A. Olsen 36.
1-2: Ndende Adama Guéye 45.
2-2: Jann Ingi Petersen br 56.
3-2: Justinus R. Hansen 77.
Dómari: Petur Reinert

B68: Hans Jørgensen - Niklas F. Joensen, Jóhan Dávur Højgaard, Ndende, Einar Tróndargjógv - Kristian Anton Andreasen (Bjarki Johannesen, 46.), Jann Ingi Petersen, Justinus R. Hansen, Remi Langgaard (Henning G. Joensen, 85.) - André Olsen (Oddur Á. Højgaard, 46.), Christian Høgni Jacobsen
Gult kort: Jann Ingi Petersen, Christian Høgni Jacobsen
NSÍ: Kristian Joensen - Monrad Holm Jacobsen (Rógvi Højgaard, 73.), Jens Joensen (Pál Mohr Joensen, 65.), Helgi L. Petersen, Sjúrður Jacobsen - Debes Danielsen, Jann Martin Mortensen, Andras Frederiksberg, Árni Frederiksberg - Magnus Olsen, Klæmint A. Olsen (Óli Arge, 75.)
Gult kort: Helgi L. Petersen, Árni Frederiksberg, Magnus Olsen

ÍF - KÍ 2-0 (2-0)

1-0: Frank Poulsen 12.
2-0: Jan Ó. Ellingsgaard 45.
Dómari: Rói Jacobsen

ÍF: Jákup Mikkelsen - Áki Petersen, Bartal Eliasen, Høgni Zachariasen, Jan Ó. Ellingsgaard - Dánjal á Lakjuni (Høgni Madsen, 67.), Karl Løkin, Frank Poulsen, Jesper Asmussen, Nenad Saric (Jákup Johansen, 77.) - Simon Skibsted (Clayton Soares, 84.)
Gult kort: Simon Skibsted
KÍ: Andras Gango - Gunnar Christiansen (Johan Jacobsen, 56.), Jógvan Isaksen, Sørmundur Kalsø, Heðin á Lakjuni (Ísak Simonsen, 14.) - Philip Djordjevic, Hjalgrím Elttør, Henry Heinesen, Andy Olsen - Henry Heinesen, Andy Olsen - Kristoffur Jakobsen, Páll A. Klettskarð (Bárður J. Heinesen, 60.)
Gult kort: Jógvan Isaksen, Henry Heinesen

Effodeildin

NR.	LIÐ	DYSTIR	VUNNI	JAVNT	TAPT	+ MÁL	- MÁL	+/-	STIG
1	B36	4	3	1	0	8	2	+6	10
2	Víkingur	4	3	1	0	7	2	+5	10
3	ÍF	4	3	1	0	7	2	+5	10
4	HB	4	2	2	0	7	2	+5	8
5	EB/Streymur	4	1	2	1	6	4	+2	5
6	NSÍ	4	1	1	2	5	5	0	4
7	B68	4	1	0	3	3	10	-7	3
8	KÍ	4	0	2	2	2	6	-4	2
9	FC Suðuroy	4	0	1	3	0	5	-5	1
10	TB	4	0	1	3	2	9	-7	1

2. umfar
Mikudagin 4. apríl

07 Vestur - NSÍ 7-0 (5-0

1-0: Jovan Radinovic-Panic 1.
2-0: Ragnar Nattestad 13.
3-0: Tór-Ingar Akselsen 29.
4-0: Torstein Mylingstind 36.
5-0: Hans Arni Ellefsen 45.
6-0: Jovan Radinovic-Panic 59
7-0: Heini Falkvard Nielsen 76.

HB - Víkingur 1-3 (1-2)

1-0: Høgni Midjord 3.
1-1: Sverri Jacobsen 26.
1-2: Sverri Jacobsen 45.
1-3: Sverri Jacobsen 82.

AB - Skála 4-2 (2-0)

1-0: Jobin Drangastein 31.
2-0: Alex Mellemgaard 45.
2-1: Brian Jacobsen 66.
3-1: Beinir Ellefsen 70.
3-2: Teitur R. Joensen 89.
4-2: Tummas Justinussen 90.

KÍ - B68 5-1 (3-0)

1-0: Bjarki Vágstún 15.
2-0: Bjarki Vágstún br 18.
3-0: Bjarki Vágstún br 44.
4-0: Andru Poulsen 49.
4-1: Uni S. Djurhuus 57.
5-1: Johan Jacobsen 86.

Mikudagin 11. apríl

B71 - EB/Str. 1-1 (0-1)

0-1: sjálvmál 10.
1-1: Thomas Hans Rubeksen br 87.

3. umfar
Leygardagin 14. apríl

B71 - Víkingur 3-6 (0-3)

0-1: Per Gregersen 10.
0-2: Heðin Hansen 17.
0-3: sjálvmál 20
0-4: Per Gregersen 53.
0-5: Ingi Sørensen 64.
0-6: Sverri Jacobsen 72.
1-6: Thomas Hans Rubeksen 76.
2-6: sjálvmál 82.
3-6: sjálvmál 90.
Reytt kort: Bogi Hermansen, B71, 80.

07 Vestur - KÍ 3-0 (3-0)

1-0: Hans Arni Ellefsen 11.
2-0: Ragnar Nattestad 18.
3-0: Tór-Ingar Akselsen 45.

Skála - B68 2-2 (2-0)

1-0: Jógvan Berg 17.
2-0: sjálvmál 33.
2-1: Búi í Hjøllum 77.
2-2: Haraldur Reinert Højgaard 78.

AB - HB 4-1 (2-0)

1-0: Dion B. Splidt 5.
2-0: Bjartur Kjærbo 33.
3-0: Martin Midjord 55.
4-0: Dion B. Splidt br 73.
4-1: Jógvan Rói Davidsen 83.

NSÍ - EB/Str. 3-2 (2-1)

0-1: Jens Michael Jensen 9.
1-1: Eddie Mikkelsen 27.
2-1: Dánial Hansen 30.
3-1: Bjarki Danielsen 64.
3-2: Jónstein Magnussen 90.
www.faroesoccer.com

4. umfar
Sunnudagin 22. apríl

NSÍ-Skála
Víkingur-AB
EB/Streymur-KÍ
HB-07 Vestur
B68-B71